

# Samkomublaðið fyri nov/des 2016

Keldan

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar







www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Hvar finni eg Gud?

*Bjørgfinnur Heinesen*

Seinastu tíðina havi eg havt møguleikan at ganga nógv runt á gøtunum í Jerusalem. Hetta er ein sannur framíhjárættur.

Tá ið eg havið gingið, havi eg lagt til merkis nógvar pílagrímar og ferðafólk av ymiskum slagi. Tað sæst í eygunum á fólki, at tey uppliva nakað serligt, og tað er nakað, sum nemir við tey, tá ið tey ganga í hesum serliga býi. Summi nýta møguleikan at syngja lovsang á gøtuni, onnur biðja á serligum bíbilskum støðum, summi vilja nerta við tey støð, ið sigast at vera har, ið Jesus hevur verið.

Tann eina dagin, tá ið eg fór niðan á Oljufjallið og hugdi yvir Jerusalem, sá eg rundanum meg fólk frá ymsum upprunum. Tað blivu tiknar myndir, summi bóðu, og ferðaleiðarar greiddu frá øllum teimum søguligu støðum, ið sóust frá fjallatoppinum.

Hetta er ein serligur býur. Hetta er býurin, har templið stóð, ið var bústaðurin hjá Gudi, áðrenn Hann tók bústað í okkum. Staðurin, ið Jesus doyði á og tók burt alla okkara synd. Eisini er hetta staðurin, har Heilagi Andin kom til jarðar, sum vit øll hava fingið atgongd til við trúgv. Ein kundi sagt, at hetta er staðurin, ið tað Himmalska møtir tí jarðiska.

Vit vilja, sum trúgvandi, kenna Skaparan og endamálið, vit sum einstaklingar, og menniskju sum heild, hava á jørð.

Tá eg sá øll hesi fólk og hugsaði um øll tey túsund fólkini, ið koma til Jerusalem hvørt ár, tí tey ynskja at fáa eina andaliga uppliving, kom eitt orð til mín:
Táið Hann av Farisearunum varð spurdur, nær ríki Guds fór at koma, svaraði Hann teimum: "Ríki Guds kemur ikki á tann hátt, at tað sæst við eygunum. Heldur ikki fer at verða sagt: "Hygg, her er tað!" ella: "Hygg, har er tað!" Tí ríki Guds er innan í tykkum." Luk. 17, 20-21.

Jødarnir á Jesu døgum, eins og í dag, bíðaðu eftir og væntaðu ríki Guds, men teirra ímynd av, hvussu ríki Guds skuldi koma, gjørdi, at teir ikki sóu tað, tá ið tað kom.

Vit kunnu uppliva nógv andaliga gott við at vitja bíbilsk og andalig støð, so sum samkomur, kirkjur og annað. Á hesum andaligu støðum kunnu vit kenna Guds nærveru og læra nógv um ríki Guds. Um tú tó ynskir persónliga at kenna ríki Guds, so mást tú koma at kenna tann Andan, ið bleiv settur í teg, tá tú bleivst frelst/ur.
Vit kunnu enntá renna frá møtirøð til aðra, men um vit ikki brúka tíð upp á Heilaga Andan, sum býr í okkum, so koma vit ikki nærri ríki Guds.

Lat okkum søkja eftir tí Guds ríki, ið býr í okkum við Heilaga Andanum og liva tað út í okkara dagliga lívi.
Brúka tíð í loynikamarinum í bøn og lesnaði.
Lat tó ikki trúnna verða nakað, ið vit goyma í loynikamarinum, tí trúgv uttan gerningar er deyð trúgv.
Lat tað síggjast líka klárt í okkara sál og likam, hvat býr í okkara anda, og lat ríki Guds lýsa upp, har tú ert.
Halt áfram at koma til tey støð, ið menniskju møtast um Jesus, men gloym ikki at brúka tíð í loynikamarinum, at koma at kenna Heilaga Andan, sum býr í tær!

# Skrá fyri nov/des

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 28. nov. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 29. nov. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 1. des. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 3. des. | kl. 20.00: | Sleepover (tilmelding krevst) |
| Sunnudagur | 4. des. | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku (eldra ættarliðið) Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 5. des. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 6. des. | kl. 10.00: | bønardagur |
| Leygardagur | 10. des. | kl. 20.00: | Jólakafé |
| Sunnudagur | 11. des. | kl. 16.00: | Barna- og familjujólaveitsla (øll eru vælkomin) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 12. des. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 13. des. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 17. des. | kl. 20.00: | AWAKE við Róa Norðoy |
| Sunnudagur | 18. des. | kl. 11.00: | Morgunmøti við ymiskari luttøku (yngra ættarliðið) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 19. des. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 20. des. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mánadagur | 26. des. | kl. 21.00: | Hosukvøld |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadagur | 30. des. | kl. 18.30: | Nýggjársveitslan (tilmelding) |
| Bønardagur | 2. jan. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 3. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 7. jan. | kl. 20.00: | AWAKE við YWAM úr Brasilia |
| Sunnudagur | 8 jan. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj (innsetan av hjálparpastori) |

# Lýsingar

**Barna- og familjujólaveitslan.**
Verður sunnudagin 11. desember. kl. 16.00.

**Global Leadership Summit 2017**
GLS 2017 verður 13. - 14. januar. Nógvir spennandi talarar eru á skránni. Samrøða við Jastrid Høj verður leygarmorgun. Gevið gætur! Prísurin hækkar 1. desember.
Les meira á www.gls.fo.

**Vit syngja jólini inn**
Vit syngja jólini inn 23. des. kl. 21.00. Umframt kaffi og okkurt gott omaná, verður hugnaligur sangur og framførslur við Maibritt H. Johansen, Eyðun Jacobsen og Signu og Olvheðin Jacobsen.

**Fløgur tøkar á netinum**
Allar fløgurnar hjá Kelduni og stakløg eru nú at finna á Spotify, iTunes og øðrum platformum. Ein leitar bara eftir "Keldan" og so verður tað funnið

**Nýggj fløga**
Martin & the revelators geva út fløgu í desember. Í hesum sambandi verður útgávukonsert í Kelduni 16. desember kl.20.00. Annbritt Lamhauge v/ bólki kemur eisini at framføra nakrar sangir.

**Nýggjársveitslan**
Nýggjársveitslan verður fríggjakvøldið 30. desember kl.18.30. Nærri kunning og tilmelding verður í næstum.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584